**Røða í sambandi við 100 ára føðingardagin hjá Rósu Højgaard f. 3. desember 1911**

Góða Rosa,

Hjartaliga til lukku við føðingardegnum. Tað er mær ein stórur heiður sum landsstýriskvinna í almannamálum at vera boðin við her í dag og tað vil eg takka fyri. Børn- , svigar-, ommu-, og langommu- og oldurommubørn, allari familjuni vil eg eisini ynskja hjartaliga til lukku við hesum stóra hátíðardegi.

Einaferð skal mæti spanski listarmaðurin Pablo Picasso hava sagt, at tað tekur langa tíð og nógv ár at gerast ungur. Góða Rosa, tú ert bæði ung í sinn og skinn. Tú ert framvegis so birg, at tú býrt heima. Tú ert framúr skilagóð, fylgir væl við, minnist sjáldsama væl og málsliga ert tú ein dýrgripur. Heilsuna hevur tú eisini sjáldama góða. Tað mugu vera fá 100 ára gomul, sum kunnu breggja sær av ikki hava verið seingjarliggjandi síðan 1959. Hetta er eitt bragd í sær sjálvum.

Rosa, tað er torført, fyri ikki at siga ógjørligt, at ímynda sær, hvat tað vil siga at fylla 100 ár. Viðførið tygara við upplivingum, við lívsroyndum, við innliti, er á tremur. Tað hava verið nógvar og stórar broytingar í føroyska samfelagnum, ja tygum kunnu minnast og hyggja aftur á eitt langt og ríkt lív.

Sum ung fórt tú út á Toftir at tæna, fyrst hjá Jóannesi og Katrinu á Líðarenda á Nesi, og síðan hjá Óla og Ingu Foldbo á Toftum. Eftir tað vart tú eitt skeið á húsarhaldsskúla hjá Frk. Nainu Scharlu Nielsen undir Kongaminni í Havn.

Á Toftum møtti tú manninum, Svend Sofus Højgaard. Svend róði út við pápanum og var til skips við beiggja sínum. Tit giftust í 1934 og búsettust á Skála, har Svend fór at starvast á skipasmiðjuni. Í 1946 fór hann til Danmarkar at læra til kavara, og starvaðist sum kavari í nógv ár. Eisini hevði hann bát og royndi m.a. eftir sild á Skálafjørðinum, fyrst við gørnum og seinni við nót. Svend gjørdist sjúkur og doyði longu í 1969, einans 54 ára gamal.

Eftirkomamarnir hjá tykkum eru ikki færri enn 111 í tali. 11 børn, har av 9 eru á lívi, 34 ommubørn, 62 langommubørn og 4 oldurommubørn, so vit kunnu bara staðfesta, at tygum eru vælsigna við nógvum børnum.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Góði gamli grikski heimspekingurin Platon er millum annað kendur fyri at siga, at honum dámdi so væl at práta við gomul fólk. Um orsøkina til, hví honum dámdi tað, segði hann, at tað eru gomul fólk, sum hava gingið tær gøtur, sum vit øll skulu ganga. Eisini vita tey, hvar gøturnar er ójavnar og knorkluttar, og ikki minst hvørjar eru lættast at ganga.

Í tygara lívsskeiði hevur verið stór samfelagslig broyting, sum tygum saman við samtíðar kvinnum og monnum hava myndað. Trupult er at siga, hvør broytingin er tann størsta. Men tað er einki at ivast í, at tað er munin lættari at halda hús í dag, enn tað hevur verið, tá tygum og maður tygara Svend "settur lunnar undir egið borð" á Skála 1934.

Í stóra heiminum hjá Rosu og Svend hevur altíð verið stórt hjartarúm. Longu í 1935 flutti mamman niðan til teirra at búgva, í 1939 flutti verfaðirin inn, og eitt langt skeið búði beiggin, Benadikt eisini hjá teimum, umframt at Rosa bar mostrini og mammubeiggjanum í Knútshúsi døgurða. Í nógv ár hevur tú ótroyttilig havt konfirmantar búgvandi, onkuntíð millum 3 og 4 í senn.

Á okkara døgum við øllum hentleikum, er næstan óskiljandi at hugsa, hvussu stórar uppgávur kona, maður og børnini høvdu, og hvussu nógv tey greiddu úr hondum, fyri at lívbjarga sær og sínum.

Nógva arbeiðið mátti leggjast væl til rættis, skuldi gerandisdagurin hanga saman. Hoyggj, velting, torvi og kúgvin, hon skuldi mjólkast fleiri ferðir um dagin. Flest øll klædnapløgg blivu virkaði heima; loyst úr lagdi og tilevnað og seymað. Og heldur ikki á hesum øki hevur tín partur ligið eftir. Tú hevur bundið og seymað mangt plaggið upp á húsfólkini, eins og tú bant nógv fyri onnur.

Tá vóru hvørki vaksimaskina ella uppvaskimaskina. Alt bleiv vaskað við hond og á vaskibretti. Harafturat bleiv hvørt klædnaplaggið vundið við hond og hongt upp á snór. Ofta varð neyðugt at bera hvítu pløggini langan veg, at leggja "á blik", at bleikja undir opnum himli, tí sápuevnini og umstøðurnar annars ikki vóru nóg góð til at fáa klæðini hvít.

Harafturat skuldi allur maturin fáast til vega og tilvirkast. Breyðini skuldu knoðast og bakast, so eygað mátti haldast við, at eldurin ikki sløknaði, meðan bakað varð. Tá var ikki møguleiki fyri at fara í handlarnar, sum í dag at keypa liðugtgjørdan mat og klæðir, sum vóru klár at fara í.

Klokkurnar vóru ikki á hvørjum skøvningi, ei heldur órógvaðu fartelefonirnar, sum í dag liggja mestsum í hvørjum lumma. Ikki var neyðugt at ansa klokkuni fyri at

luttaka í venjingum av ymsum slagi ella teldur, sjónvarp o.m.a., sum børnini í dag eru upptikin av. Tá spældu børnini frítt um tún og teigar, hóast ein partur av spælinum var at taka lut í tí arbeiði, sum tey vaksnu gjørdu.

Tygum bretti upp um armar og luttók í øllum neyðugum arbeiði. Kríatúrini skuldu ansast, veltast skuldi, og klippfiskur røkjast, tá tørvur var á tí. Í øllum hesum arbeiðinum hava tygum, saman við tygara samtíðarfólkum, lagt ein stóran arv eftir tygum, sum nútíðarsamfelagið kann heysta. Hóast strævið lív, so kunnu tygum halda 100 ára føðingardag í dag.

Eg havi ómetaliga stóra virðing fyri tí stóra arbeiði, sum tygum og føroyskar møður hava útint, meðan menninir vóru í arbeiði og fingu til føðina. Sagt verður, at arbeiðið hjá einari mammu var ósjónligt, tá tað varð gjørt, meðan øll løgdu til merkis, um mamman ikki gjørdi sítt arbeiði.

Hesi konubrot standa oftast í skugganum av monnunum – og teirra ævisøgur verða sjáldan fortaldar. Men Rosa, tykkara verk hevur lagt lunnar undir menningina av okkara samfelag. Og tað vilja vit siga stóra takk fyri.

Eg fari at enda við einum broti úr vøkru yrkingini eftir Hans Andrias Djurhuus, sum eg haldi hóskar so væl til tygum:

“Alt átti so friðarligt hvíldarlag –<br>
Kvøldarhvíld eftir stravnan dag.<br>
Sólin var farin um fjallaskarð,<br>
tó enn stóð glæman og lýsti har”.

Enn einaferð hjartaliga til lukku við føðingardegnum

Takk fyri!

Annika Olsen

Landsstýriskvinna í almannamálum

**Festivitas:**
**Føðingardagurin verður hildin í Leguhúsinum í Nesvík leygardagin 3. desember millum kl. 16 og 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.**